# Hugbirtingar á lørifti



*Kári og Ásla Rannvá Svensson hava fest hugbirtingar á lørift, og sýna hesi verk fram í Fuglafirði komandi tíðina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kári Svensson og dóttirin Ásla Rannvá Svensson lata sunnudagin upp framsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Tey fara at sýna fram verk undir heitinum Hugbirtingar**

LIST
*Eyðun Klakstein*

Hetta er aðru ferð, at Kári og Ásla Rannvá Svensson hava framsýning saman, og meðan fyrra framsýningin var í høvuðsstaðnum, leita tey sær nú til Fuglafjarðar við sínum verkum.

Framsýningin hjá teimum letur upp í Ribarhúsi sunnudagin kl. 15.00, og tá fara Eyðun á Lakjuni og dóttirin at spæla. Eini 30 verk verða við á framsýningini, sum hevur opið til 19. november.

– Verkini á framsýningini eru upplivingar, sum vit hava havt, og sum vit síðani hava roynt at fáa á lørift. Meðan verkini hjá dóttrini mest eru tankar, so havi eg serliga fingið íblástur út náttúrini, sigur Kári Svensson.

– Tað kann vera okkurt, tú sært, eitt partur av einum bergi, sum hugtekur teg, ella okkurt annað. Síðani ræður tað um at fáa tað úr høvdinum og niður á løriftið.

### Heldur 50 ára dagin

Kári Svensson er ein av okkara kendastu listarmonnum. Hann sýnir nógv fram í útlondum, og hann livir av listini. Ásla Rannvá er 24 ára gomul, men hevur longu verið við á fleiri framsýningum – eitt nú Várframsýningini og Ólavsøkuframsýningini. Hjá henni er listin ítrív.

Kári Svensson hevur júst havt framsýning í Danmark, og nú arbeiðir hann fram ímóti eini stóra framsýning í Føroyum síðst í januar.

– Eg verði 50 ár næsta ár, og í tí sambandi fari eg at hava eina framsýning á Listasavninum, har eg fari at hava bæði málningar og skulpturar við, sigur hann.

Hendan framsýningin fer á ferð, eftir at hon hevur hingið uppi í Føroyum. Í mars gongur leiðin til Randers Kunstmuseum, og ætlanin er at hava framsýningina aðrastaðni í Norðurlondum eisini.

Men fyrsti møguleikin at síggja verk hjá Kára Svensson, hesaferð saman við dóttrini, verður í Fuglafirði komandi tíðina.

Framsýningin er opin gerandisdagar frá 15.00 til 17.00 og leygardagar frá 11.00 til 13.00.


**Tøkk**

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg 90 ára degnum við blómum, fjarritum og heilsanum.

Vinaliga
**Niels Pauli Djurholm, Kollafjørður**



Føðingardagstilboð !!!

Gólvbúni hevur føðingardag og í tí sambandi hava vit sera góð tilboð uppá bað/vátrúm allan november.

Vit kunnu bjóða serútbúgvi fólk innan vátrúmi við góðkendum sveisisertifikati.

Ring og vit bjóða tær óbindandi tilboð.
Vit ráðgeva sjálvandi eisini.

Sjálvandi gera vit eisini alt annað innan gólválegging við 30 ára hollum arbeiðsroyndum.

vinyl
linolium
teppir
trægólv

Gólv Búni
telefon 210115 · 210116




# Toskur fyri 10.000 krónur



*Heðin Joensen við toskinum, sum gav 10.000 krónur – her saman Peturi Steingrund og Hjalta í Jákupsstovu á Fiskirannsóknarstovuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Heðin Jensen úr Havn fekk 10.000 krónur fyri ein tosk, sum línuskipið Thomas Nygaard fiskaði vestan fyri Mykines.**

PENGAR FYRI FISK
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eina ferð um árið hevur Fiskirannsóknarstovan eitt lutakast um 10.000 krónur. Hetta lutakastið er millum teir persónar, sum hava latið stovuni fiskimerki seinasta árið.

Fiskirannsóknarstovnan merkir javnan fisk, og tá ið hesi merki verða funnin aftur undir fiskiskapi, skulu tey sendast Fiskirannsóknarstovuni.

Persónarnir, sum senda fiskamerki inn, eru síðani við í lutakastinum um tær 10.000 krónurnar.

### Lutakast í Klaksvík

Lutakastið var á kantinuni á Kósavirkinum í Klaksvík fyrr í vikuni, og navnið, sum varð drigið upp úr posanum, var Heðin Jensen úr Havn. Heðin er við línuskipinum Thomas Nygaard, sum var tað skipið, sum hevði sent flest fiskamerki inn.

Tann 25. apríl í ár fekk Heðin ein merktan tosk, meðan teir royndu vestan fyri Mykines. Toskurin var merktur 25. oktober 2002 á nærum sama staði, har hann var fingin.

### Toskur við stórum virði

Toskurin, sum var 70 cm til longdar, var rak og var ikki vaksin nakað hesa tíðina.

Hóast hesin toskurin var eins og flestu aðrir toskar, fekk hann eitt virði á 10.000 kr. Tað má uttan iva vera tann virðismesti toskurin, sum er landaður í ár. Fiskirannsóknarstovan ynskir Heðini tillukku við vinninginum og takkar øllum, sum lótu fiskamerkir inn. Eftir ætlan verður lutakast aftur um eitt ár.


NÝTT
Netbóking
Nú kanst tú keypa tína ferð á atlantic.fo
Nú er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways. Vit hava nevniliga fingið netbóking á heimasíðuni. Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil. Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.
Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club
ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



B36-arar! Innanduravenjingarnar byrja aftur mánadagin 3. november í Ítróttahøllini!

| Kl. | Lið |
|---|---|
| **Mánadagur** | |
| 15.00-15.45 | Smápiltar yngri |
| 15.45-16.30 | Smápiltar eldri |
| 16.30-17.15 | Pinkulingar 98/99 |
| 17.15-18.00 | Pinkulingar 97/96 |
| 18.00-19.00 | Gentur 10-12 (ómakað vikunr.) |
| 18.00-19.00 | Gentur 12-14 (makað vikunr.) |
| **Mikudagur** | |
| 15.00-16.00 | Piltar |
| 16.00-17.00 | Pinkur |

B36 - vit síggjast í ítróttahøllini!



Fyll Frælsi á telefonina á www.kall.fo
Galdandi frá mikudegi 29. oktobur og eina viku fram
Keyp fyri 50,- fá 70,- spar 40%
Keyp fyri 100,- fá 150,- spar 50%
Keyp fyri 250,- fá 400,- spar 60%
kall